

# SUKURLØÐSLA

*Vegleiðing til barnakonur*

SJÚKRAHÚS VERKIÐ

## VEGLEIÐING TIL BARNAKONUR Í SAMBAND VIÐ KANNING AV BLÓÐSUKRI (SUKURLØÐSLA)

Tú hevur fingið ávísing til sukurløðslu. Ein sukurløðsla merkir, at blóðsukrið verður mátað við eini blóðroynd eftir at hava drukkið eina ávísa mongd av sukurvatni. Kanningin kann vísa, um tú hevur byrjandi sukursjúku.

## FYRIREIKING TIL KANNINGINA

3 dagar áðrenn kanningina eigur tú at hava etið og verið likamliga virkin sum vanligt.

Tú eigur at fasta frá kl. 22 kvøldið fyri, t.e hvørki eta, drekka, roykja, tyggja tyggigummi ella líknandi. Eitt sindur av vatni er loyvt at drekka.

## Á DEGNUM

Fyrst verður ein blóðroynd tikin. Síðan fært tú 200 ml. av sukurvatni við sitrón at drekka. 2 tímar seinni verður aftur ein blóðroynd tikin. Hetta tíðarskeiðið kanst tú sita í forhøllini ella á ambulatoriinum. Tú eigur ikki at vera likamliga virkin, sum t.d. ganga, geva bróst, roykja, ei heldur sovna. Tú kanst heldur ikki eta ella drekka hesa løtuna.
Sig bioanalytikara frá, um tú gerst illa fyri ella vilt spýggja.

Tú ert vælkomin at hava hondarbeiði ella okkurt at lesa við, so tíðin ikki fellur so long.

Kanningin er liðug eftir uml. 2½ tíma.

## EFTIR KANNINGINA

Eftir kanningina kanst tú vera troytt. Vit mæla tær til at hava okkurt etandi og drekkandi við, sum tú kanst fáa tær, so skjótt kanningin er liðug.
Tú kanst fara til hús ella til arbeiðis, og tú kanst eta og drekka sum vanligt.

## ÚRSLIT OG SVAR

• Er blóðroyndin normal, hoyrir tú onki.

• Barnakonur við blóðsukri yvir 9 mmol/l eftir 2 tímum hava tá barnakonusukursjúku (eisini kallað gestationel diabetes mellitus - GDM).

• Er blóðroyndin ov høg, fært tú bjóðað eyka kanningar.

• Tær barnakonur, ið hava eina ov høga sukurløðslu, fáa eina tíð í Diabetes ambulatoriinum við vegleiðing frá sjúkrarøktarfrøðingi og kostráðgeva.

• Tú fært harumframt tíð til skanning á Obstetriska ambulatoriinum á Føðideildini.

## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

Tú verður biðin um at møta í Ambulatoriinum hjá Rannsóknarstovuni kl. 8.00 ásetta dagin. Ambulatoriið er til høgru frá leiðbeiningini. Um neyðugt er at broyta tíðina, sig frá á tlf. 304520.

## Á KLAKSVÍKAR SJÚKRAHÚSI

Tú verður biðin um at møta kl. 8.00 á Rannsóknarstovuni. Ikki er neyðugt at biða sær tíð.

## Á SUÐUROYAR SJÚKRAHÚSI

Tú verður biðin um at møta kl. 8.00 á Rannsóknarstovuni á Suðuroyar sjúkrahúsi. Ikki er neyðugt at biða sær tíð.

- *Kom í góðari tíð. Tað kann verða trupult at finna p-pláss til bilin við Landssjúkrahúsið.*

- *Boða frá: Um ikki ber til at møta ásettu tíðina, sig vinarliga frá á sjúkrahúsinum og avtala eina nýggja tíð.*